Starvslýsing

Heimatænastan

## ENDURLÝSING eftir starvsfólki til Eldrasambýlið Oman Mattalág í Tórshavn

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum og heilsuhjálparum í starvsbrøki 0,7 ella 0,8 og ítrivsvegleiðara í starvsbrøki 0,5 at starvast í nýggja Eldrasambýlinum Oman Mattalág í Tórshavn og at byrja 1. august 2008.

Eldrasambýlið Oman Mattalág er partur av Heimatænastuni Øki 1 í Suðurstreymoy og pláss er fyri 9 búfólkum.

**Hugsjónin fyri Heimið**
Miðað verður eftir at skapa eitt heimligt og virkið umhvørvið út frá Eden hugsjónini og við virðing og umsorgan at stuðla undir virkisførleika og vælveru hjá tí einstaka búfólkinum.

**Vit vænta av tær, at tú hevur**
- Áhuga í og gleði við at arbeiða við eldri fólki
- Vilja til at starvast í tráð við hugsjónina fyri Heimið
- Vilja at starvast út frá Eden hugsjónini
- Er til reiðar at bróta upp úr nýggjum og ganga aðrar leiðir
- Dugir væl at samstarva og samskifta við onnur
- Er motiverað og fleksibul
- Kann arbeiða í skiftandi vaktum

**Vit kunna bjóða**
- Eitt spennandi og mennandi starv, har tú hevur møguleika at vera við til at byggja upp eitt heim í tráð við hugsjónina fyri Heimið og seta dám á umhvørvið.
- Góða innleiðslu
- Møguleika fyri persónligari menning

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Lønar og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til økisleiðara Ceciliu Vestureið á telefon 217249 ella við telduposti: ceciliav@naerverk.fo ella til deildarleiðaran Tórhild Dalsgaard á telefon 217123 ella við telduposti til torhildd@naerverk.fo

**Umsókn**
Send eina umsókn við avrit av prógvi og upplýsingum um útbúgving og fakligar royndir til:

**Heimatænastan**
Stílað: Cecilia Vestureið, økisleiðari,
Skálatrøð 14
FO-100 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 13. juni 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Stuðlar til Stuðulstoymið og Kafeina í Suðurstreymoy

- **Eitt farloyvisstarv 40 tímar um vikuna til 31.08.09**
- **Eitt farloyvisstarv 40 tímar um vikuna til 31.12.08**
- **Eitt starv 30 tímar um vikuna**

Stuðulstænastan hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan til brúkarar um alt landið. Stuðulstoymið og Kafein arbeiða saman sum ein eind, samansett av einum tvørfakligum starvsfólkabólki, sum heldur til í hølunum hjá Stuðulstænastuni í Løkjatúni 1 á Argjum.

Málbólkurin hjá Stuðulstoyminum er heimabúgvandi fólk omanfyri 18 ár, ið hava ein skerdan sálarligan virkisførleika.

**Arbeiðið hjá stuðulstoyminum fevnir m.a. um**
- At stimbra og menna praktiskar og sosialar førleikar hjá brúkaranum.
- At skipa so fyri, at brúkarin fær møguleikan at leggja gerandislív sítt soleiðis til rættis, at tað verður í samsvar við egnan tørv og normar.
- At luttaka í arbeiðnum sum Løkjukafein skipar fyri

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú:
- Hevur eina viðkomandi útbúgving og royndir innan psykiatriska økið.
- Kann arbeiða sjálvstøðugt og einsamallur í heimi brúkarans og samstundis kann átaka tær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intuitión.
- Vísir áhuga og virðing fyri brúkaranum og samstundis arbeiðir professionelt.
- Er sterkur bæði til likams og sálar.

**Stuðulstænastan bjóðar**
- Eitt spennandi arbeiðspláss við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning
- Ein virknan, tvørfakligan starvsfólkahóp
- Samávirkan á gerandis uppgávur
- Kunning í arbeiðinum og supervision

**Setanartreytir**
Setanarøkið umfatar Nærverkið og deildir undir tí. Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Roknast má við, at arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi, dag-, kvøld-, og vikuskiftisarbeiði.

Fleiri upplýsingar um starvið eru at fáa hjá samskiparanum Elsu Klein Olsen, tlf 554024.

Størvini verður sett 01.07.2008 ella skjótast aftaná.

**Umsókn:**
Umsóknir skulu sendast til:

Stuðulstænastan
Argjavegur 26
160 Argir
Stílað.: Elsa Klein Olsen

**Umsóknarfreist: 13. juni 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo


# Ov tíðliga í verðina



Í Prematurfelagnum stuðla og ráðgeva vit foreldrum at ov tíðliga føddum børnum.

Telefonlinja okkara svarar mánadag til hósdag á tlf 263868

Eisini ber til at skriva til okkara á prematur@post.olivant.fo


um...
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
...er lisin
-so ert tú við!